*framhald av síðu 19*

drúgv. Tað órógvar sinni, um bíðað verður ov leingi. Bíðitíðin kann skapa ein ótta, sum í sjálvum sær er veruligur, sjálvt um orsøkin til óttan reint fakliga er óverulig.

At heilsuverkið hevur sjúklingin í fokus, krevur rættiliga nógv av starvsfólkinum bæði við atliti at yrki og atferð. Afturat kravinum um góða røkt og holla viðgerð kemur so ynskið um samskifti á einum rímiligum støði. Tað er júst samskiftið, íð stendur sum eftirmetandi yvirskrift yvir hvørjari vitjan á einum sjúkrahúsi. Serliga tá eingin heilsubót er at fáa, er tað umráðandi, at samskiftið og starvsfólkanna kropsmál staðfestir, at brúkarin av heilsuverkinum er sæddur.

Starvsfólk mega kenna seg sjálvan og sín egna dagsform. At arbeiða við menniskjum er bæði gevandi og krevjandi. Tá sjúkrafrøðin kemur so nær at sjúklinginum bæði kropsliga og sálarliga, er vert at varnast sína egnu sinnistøðu og tann likamliga dagsformin. Samskiftið verður tilvitað ella ótilvitað ávirkað av okkara egna dagsformi, bæði tá vit eru avsendara og móttakara.

Er javnvágin í okkara egna sinni órógvað av tí heimliga t.d. sjúk børn, ella likamsorkan er niðursett av t.d. vøku, so mega nevndu faktorar takast við í eini heildarmeting, hvussu samskiftið við sjúklingin skal skipast og fremjast.

Óhóskandi er í øllum samskifti at brúkarin av eini tænastu merkir hjáárin av støðu teirra, íð útinna tænastuna.

Samskiftið er sostatt meira enn fakligur førleiki og faklig mørk. Livandi samskifti er at lata seg upp sum eina opna bók til sjúklingin at lesa. Verður bókin ikki latin upp, lesur sjúklingurin permuna. Fyri starvsfólkið er gagnligari, at sjúklingurin lesur um menniskjansligan hita heldur enn at lesa eina óviðkomandi stílreina permu og síðani gita seg til restina í egnum hugmyndum.

### At stíga inn í løtuna

Út frá einum etiskum sjónarhorni er samskiftið livandi, og vit kenna ikki vegin til úrslitið, fyrr enn vegurin er gingin. Reint fakliga veit sjúkrarøktarfrøðin sum serkunnleiki, hvat tað ætlaða málið við samskiftinum er, men hvør samtala gongur sín egna veg, tí menniskjan er ymisk av lyndi. Og standardisera samskiftið boðar frá lágum emotionellum og sosial etiskum inntelligensi.

Tað stílreina samskiftið kann tykjast heldur stirvi. Sjálvt um sjúkrarøktarfrøðin arbeiðir á einum staði, har tey klinisku viðurskiftini annars verða raðfest frammalaga, so er tað ikki neyðugt, at samskiftið við sjúklingin verður kliniskt reinsað.

Tað vísir seg mangan, at t.d. humor kann gera eina reint formliga samrøðu mikið meira viðkomandi. Eitt smíl kann fáa glið á eina annars fastlasta støðu.

Út frá einum etiskum sjónarhorni hevur samskiftið tað best, um vit tora at stíga inn í løtuna. Størsti bágin fyri livandi samskifti er ovurvarni, tað at vit halda okkum burtur. Ovurvarni er kvalandi, tí sjúklingurin avlesur sítt egna virði í tí samskiftishátti, sum starvsfólkið nýtir. At vera varin, hóvligur og umhugsin er ein dygd. Men óttin fyri at gera mistøk í samskiftinum er besta uppskrift uppá, hvussu samskiftið skal miseydnast. Samskiftið er ein livandi mekanisma, og um tað livandi elementið er burtur, so er tað ikki samskiftið men einvegis tala. Tíðin er langt síðani farin frá einvegis talu, sjálvt um innihaldið er fakliga korrekt.

Samskiftishátturin, mátin vit gera tingini uppá, er avgerandi fyri úrslitið. Tann væl valdi framferðarhátturin ber í sær eitt rímiligt úrslit. Snáva vit í samskiftinum, kemur heilsubótin at liva í skugganum av einum vánaligum samskifti. Og tað er júst hetta, íð sjúklingurin hevur við í síni eftirmeting, tí reint fakliga verður kravt av allari frøði, at arbeiðið verður gjørt til lítar og nøktandi. Tað er eitt krav, sum bæði sjúkrahúsverkið, starvsfólk og brúkarin eru samd um, at tænastan skal verða á einum fakliga høgum støði.

### Endi

Nú »felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar« heldur fimtan ára føðingardag og ráðstevnu við heitinum »sjúkrarøktin á vegamóti«, havi eg eingi góð ráð at geva.

Hinvegin kann eg sum vakin eygleiðari og rímiliga virkin brúkari av fakliga førleika tykkara staðfesta, at tit gera eitt dygdargott arbeiði, at tit eru menniskjanslig, at tit duga tykkara yrki og duga at bera tykkum. Tíðin loyvir ikki nógv dømi, men talan er um eina menning, og ein liður í hesi menning er tykkara tilvitaða samskiftið.

Treyðugt so, alt er ikki fullkomið, og viðhvørt gera vit mistøk. Eisini her mega vit tora at stíga fram og viðganga, at tann menniskjansliga tilveran ikki er streymlinjað. Flogførini verða bygd, so tey taka minst møguligan vind á seg. Men tann menniskjansliga tilveran er ikki streymlinjað. Vit skulu í fakligum samskifti tora at halda fast við henda veruleikan, og so gera okkara besta. Tá tað besta er gjørt, - sjálvt um tað fakliga úrslitið gjørdist næstbest, er tað út frá einum etiskum sjónarhorni ikki hóskandi at krevja meira.

Hvar eru mørkini í etiskum samskifti? Hvat kunnu vit loyva okkum reint málsliga ella kropsliga? Hvat er sømilig atferð? Hvussu nógv orka vit at geva fakliga og menniskjansliga? Hvussu nógv orkar og ynskir sjúklingurin?

Hesar spurningar lati eg verða ósvaraðar. Vil lýsa mína tøkk til sjúkrarøktarfrøðina við einum broti úr eini longri søgu :

Fyri fleiri árum síðani var eg á sjúkrahúsi. Kendi meg sera ússaligan. Var bangin og óttafullur, tí eg hugsaði um míni kæru og sosialu framtíð teirra.

Eg var bangin. Ótti, angist og sálarkvøl. Óttin fyri tí kenda og hin ókendi óttin, íð gjørdist angist. Ein sjúkrarøtrafrøðingur tók í hondina á mær. Hon segði nøkur vinarlig orð. Hon setti seg á songarstokkin og tók um meg. Tað var hiti og nærvera. Eg kendi løtuna sæla, og kom spakuliga aftur fyri meg.

Tøgnin er týðandi táttur í øllum samskifti. Og sum í teim mest spennandi filmunum draga vit teppið fyri.


# Starvslýsingar á www.portal.fo

**Kostnaður:** (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

**Kostnaður:** (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

Sosialurin
– hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo





## Hús til sølu



á Villingardalsvegi 1 um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 218888**

FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9[00]-17[00]*
*annars sambært avtalu.*
*Vøruskrá kann fáast!*

TERA
www.tera.fo
Info@tera.fo
600 Saltangará
Postboks 49
Tlf. 448888

Mitac 8640 Value



***Spesifikatiónir:***
*Harðdiskur: 20 Gb*
*Skermkort: SiS*
*RAM: 256 MB DDR Ram*
*CPU: 2000 Mhz Pentium 4 Celeron*
*Skermur: 14" TFT SXGA 1024 x 768*
*Hátalarar: Innbygdir*
*DvD-Støð/Cd-Brennari Combo Drev*
*Netkort: 100 Mbit*
*Modem: 56k*
*Windows XP*
*Firewire*
*Usb 2.0*

MiNote 8640



Sera góður prísur!
9995,-

MITAC www.mitac.com

*Fyrivarni verður tikið fyri prísbroytingum og prentvillum*

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Norðoya Javnaðarfelag

**Aðalfundurin**
sum var lýstur at verða 20. oktober kl. 19.00, er úrsettur til 3. november 2003.

Skrá sambært lógum felagsins.

Formaður Javnaðarfloksins og tingmanningin luttaka.

**Nevndin**

FISKISKIRANNSÓKNARSTOVAN

## Fiskamerkir

Seinasta freist at lata fiskamerkir inn, sum skulu luttaka í lutakasti um 10.000 kr., er 20. oktober.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
Postmoga 3051
110 Tórshavn

# Koyrikort?

Nýggj teoriskeið byrja mánadagin 20. okt.
Kl. 17.30 til persónbil og kl. 18.30 til lastbil

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99

Jekaragøta 10 • Tórshavn

SISERO 351800

## LANDSFUNDUR

Landsfundur Fólkafloksins verður leygardagin 15. november í Vágunum.

Nærri verður lýst seinni.

**Landsfelag Fólkafloksins**

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**
**Prime Minister's Office**

# Starv sum løgfrøðingur

Á Stjórnardeild Løgmansskrivstovunar er eitt starv sum løgfrøðingur leyst at seta frá 1. desember 2003.

Viðkomandi skal taka sær av løgfrøðiuppgávum í teim málum, ið løgmaður situr fyri, løgfrøðiligari ráðgeving, fyrisitingarpolitikki, uppgávum í sambandi við eftirlit løgmans, stýrisskipan og stjórnarviðurskiftum annars. Harumframt fær viðkomandi møguleika at granska í og viðgera løgfrøðispurningar, sum eru serliga viðkomandi fyri virkisøki løgmans.

**Førleikakrøv og royndir**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar eru útbúnir løgfrøðingar og hava hollar royndir frá privata og ella almenna sektorinum. Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera miðvísir, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava skil fyri teim viðurskiftum, sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting.

**Løn- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingarfelag Føroya. Um viðkomandi, sum settur verður, hevur serligan førleika, er møguleiki at verða settur sum ráðgevi.

Viðkomandi verður settur á Løgmansskrivstovuni, men fer at starvast í hinum stjórnarráðunum í avmarkaða tíð.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsrensli o.ø. skulu vera Løgmansskrivstovuni, Postrúm 64, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. oktober 2003.

Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Barbaru á Tjaldrafløtti, deildarstjóra tlf: 35 10 10, at fáa nærri upplýsingar um starvið.

Løgmansskrivstovan styðjar løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

# RYGESTOP
MED FULD GARANTI!



Opfølgningskurser tilbydes for dem der har været på et Easyway-rygestopkursus

**Kursusdatoer:**
**20. okt og 21. okt**

Tilmelding nødvendig på mette@easyway.dk eller (0045) 5190 35 36

Allen Carr's Easyway
Det lette rygestop
www.easyway.dk
tlf. 5190 35 36